# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Bárður Nielsen leiddur í KT-óføri?

Tað frættist, at Gjaldstovan (GS) rópar varskó, tí at almennir stovnar vilja sleppa úr Búskaparskipan Landsins. Bárður Nielsen sigur, at "um nøkur ár" skulu allir stovnar brúka Búskaparskipan Landsins. Hevur landið veruliga eina so frálíka fíggjarstýringsskipan, at hon ikki gerst ótíðarhóskandi eftir eitt tíggjuáraskeið, eins og stórt sæð alt annað innan KT heimin? Er trupulleikin veruliga, at landið ikki hevur ordiliga stýring á, ella er trupulleikin bara, at stovnarnir ikki vilja nýta júst ta skipan, ið GS hevur brúkt nógvar pengar at ment?

Hvussu nógv hevur skipanin hjá landinum kostað at ment? Hvussu tíðarhóskandi er hon? Hvussu brúkaravinarlig er hon? Hvørjar fyrmimunir gevur hon framum aðrar skipanir? Hvat kostar hon í rakstri? Er hon bíligari enn aðrar skipanir, íroknað menningarkostnaðin? Hvørjar upplýsingar, sum landsins skipan gevur, kunnu ikki fáast burtur úr einari fíggjarsstýringsskipan, sum stórt sæð allur heimurin nýtir? Hvat er argumentið fyri, at landið mennir egnar skipanir, sum í dag at kalla kunnu fáast sum hillavørur?

Hesir spurningar eigur Bárður Nielsen at fáa svaraðar, áðrenn hann roynir at forsvara skipanina hjá GS, ið eftir øllum at døma ikki klárar kapping. Seljast kann almenna skipanin helst heldur ikki, tá man eftir øllum at døma noyðist at hótta almennar stovnar til at brúka hana. Tað vildi av sonnum verið ein gøla, um man vil tvíhalda um eina óbrúkiliga og ótíðarhóskandi skipan

Tað kann ikki koma óvart á Bárð Nielsen, at ábyrgdarfullir stovnsleiðarar til eina og hvørja tíð ynskja at nýta tey mest tíðarhóskandi amboðini til endamálið. Marknaðurin og KT vinnan eru full í effektivum fíggjarstýringsloysnum. Ein ordilig fíggjarstýringsskipan kann geva allar tær upplýsingar, einum tørvar, nær sum helst.

Tað tykist vera sera reaktionert í hesum visiónstíðum, um landið ikki loyvir stovnum at brúka tey bestu og bíligastu KT amboðini. Uppaftur meiri ótrúligt er tað í einum heimi, har KT skipanir næstan gerast ov gamlar tann dag, tær koma á marknaðin, at hoyra ein landsstýrismann tosa um, at landsins egna óseljiliga forrit skal brúkast av øllum stovnum "um nøkur ár". 2015 er um nøkur ár! Skulu almennu Føroyar tá vera á einari teknologiskt afturúrsigldari oyggj?

GS má kunna lista krøvini til fíggjarupplýsingar frá stovnum. Stovnsleiðarar burdu so fingið litið upp í hendi at havt tær skipanir, ið kundu givið hesar upplýsingar til ásettu tíðina. Tey, ið so vildu brúkt landsins fíggjarstýringsskipan, kundu brúkt hana, meðan tey, sum ikki vildu, kundu brúkt aðrar skipanir, ið nøktaðu sama tørv. Um stovnarnir skifta til aðrar skipanir, er skipanin hjá GS ikki kappingarfør og eigur at vera kasserað. Røttu avvarandi burdu so lært av tí, heldur enn at farið til Landsgrannskoðaran. Soleiðis er veruligi heimurin innrættaður.

**Sosialurin**

## Barnafilmar á føroyskum í Bókaklubbanum

**JOHN JOHANNESSEN**
Løgtingsmaður
www.john.fo



**Tíðin er komin til at víðka frálíku skipanina við Barnabókaklubbanum, so hon eisini fevnir um sjónvarpstilfar. PISA kanningin staðfestir, at neyðugt er at styrkja lesiførleikan og harvið málsligu styrkina hjá okkara ungu. Vit eiga at byrja við teimum yngstu. Tí mugu vit taka ítøkilig stig til at føroyska eitt úrval av væl umtóktu barnafilmunum, ið annars verða keyptir í hvørjari sølubúð á útlendskum máli.**

Vit foreldur kenna øll støðuna. Hetta við teimum trimum valmøguleikunum á sjónvarpsskíggjanum: Skulu vit velja danskt, enskt ella kanska íslendskt mál, tá vit loyva okkara smáu børnum at síggja ein annars frálíkan barnafilm, ið vit júst hava keypt?

Sjálvur havi eg higartil valt frásagnarleiklutin. Tað merkir, at eg av og á siti saman við barninum og umseti nakað av tí, ið sagt verður. Men ongin ivi er um, at sjónleikarar duga hetta betri enn eg og flestu foreldur annars. Og sjálvandi er tað eisini stuttligari og meira spennandi hjá barninum at hoyra sjálvan figurin í filminum tosa føroyskt, heldur enn hissini umseting frá mammu ella pápa.

**PISA og førleiki**
Nógv umrødda PISA kanningin hevur staðfest, at næmingarnir í føroyska fólkaskúlanum hava ilt við at lesa ein tekst og skilja innihaldið. Hetta er ein rættiliga álvarsamur trupulleiki, ið vit øll eiga at leggja nógva orku í at basa.

Mentamálaráðið mælir til at betra um støðuna við at áseta eitt hægri tímatal til yngstu flokkarnar í fólkaskúlanum. Hetta við teirri grundgeving, at serkøna ráðgevingin hevur staðfest, at grundleggjandi førleikarnir á økinum verða best mentir meðan børnini enn eru heilt ung. Somuleiðis mæla Mentamálaráðið og serfrøðin annars til at styrkja munandi um undirvísingartilfar á føroyskum máli til allar lærugreinir í fólkaskúlanum.

Hesi bæði tilmæli eru frálík og eiga at verða sett í verk beinan vegin. Men eg eri sannførdur um, at skulu vit veruliga taka tøk á hesum øki, skulu vit eisini náa børnunum, ið enn ikki eru farin í skúla. Hetta er eisini í tráð við tað, ið serfrøðin hevur ført fram í sambandi við drúgva orðaskiftið um úrslitið av PISA kanningini.

**Bókaklubbin er dýrgripur**
Vit eiga ein dýrgrip, ið seinastu tjúgu árini hevur lagt ómetaliga stóra orku í at útvega okkara smæstu spennandi lesitilfar av bestu góðsku. Her meini eg við Barnabókaklubban hjá Bókadeild Føroya Lærarafelags. Loyvi mær at staðfesta, at júst hetta virksemið hevur eggjað mongum til bókina og ment málsliga førleikan hjá mongum barni frá heilt ungum aldri.

Orsakað av Barnabókaklubbanum, frálíkum høvundum, frálíkum umsetarum og frálíkum teknarum snýr lesiligt barnatilfar seg ikki longur bert um at skera torv við abba, gomul skjaldur, ella um frásagnir við grúgvuna. Slíkt sum vit, tá eg var barn, als ikki tímdu at lesa. Tað var jú púrt ongin samanhangur ímillum tilfarið og samfelagið, ið vit livdu í. Har var ongin identifikatión.

Tíbetur er støðan broytt. Og enntá finnast nú spennandi peikibøkur til tey eitt ára gomlu á føroyskum. Men enn vanta barnafilmarnir.

**Vaksa um dýrgripin**
Filmur og audiovisuelt tilfar annars er eisini við til at menna børn, um vit halda okkum frá bara at nýta tað sum barnagentu. Vit hava tíbetur barnasendingar á føroyskum bæði í útvarpi og sjónvarpi. Harumframt syrgja dugnaligir sjónleikarar og umsetarar fyri, at ein partur av útlendska barnatilfarinum verður umsett og sent í sjónvarpinum. Herímillum er eisini tilfar, sum er uppi í tíðini – sum er væl umtókt fyri tíðina.

Hetta er kortini ov lítið. Tilfarið í sjónvarpinum er bara atkomiligt ávísar klokkutíðir. Harumframt er talan um ov líti av tilfari.

Tí eigur politiski myndugleikin at seta pening av til at umseta og føroyska so nógv av modernaða audiovisuella barnatilfarinum sum gjørligt og fáa tað givið út fyri ein prís, ið er kappingarførur við ensku og donsku útgávurnar. Til dømis kann tilfarið verða sent út gjøgnum Bókaklubban.

Við hesum sleppa vit undan, at ein partur av spælinum hjá børnum gongur fyri seg á fremmandum máli. Vit fáa styrkt móðurmálið. Harumframt stuðla vit føroysku sjónleikarunum fíggjarliga, við at bjóða teimum hesa føstu almennu uppgávu.

Mín áheitan er, at Mentamálaráðið í samstarvi við Kringvarpið og sjónleikararnar alt fyri eitt tekur stig til at fáa givið út ein stóran part av tilfarinum, ið longu er gjørt. Harumframt eigur ráðið beinan vegin at fara í gongd við at fyrireika skipaða umseting av audiovisuellum barnatilfari.

## Rættleiðing til Kaj Leo Johannesen

**ATLI HANSEN**



Mínar viðmerkingar stava ikki bert frá seinastu meiningarkanningunum. Sum Kaj Leo helst veit so var eg stillari til annað formansvalevni á landsfundinum 2006.

Tá íð eg havi viðgjørt leiðslutrupulleikarnar í Sambandsflokkinum, havi eg bert víst til tann vantandi førleika, sum eg haldi, at bæði formaður og næstformaður hava til at leiða flokkin. Tað hevur einki við illvilja móti persónunum at gera, men sprettir av einum innarligum ynski um at tað má gangast Sambandsflokkinum væl.

Formaðurin roynir at verja seg við í eini blaðgrein at lýsa mítt generalieblað. Svarið vísir mær eina síðu av formanninum, sum eg ikki kendi og sum undir ongum umstøðum ger hann betri egnaðan til at vera formann í mínum eygum. Hugurin til at viðgera mín persón sær út til at vera størri enn evnini til sjálvrannsakan.

Eg seti meg tívverri ikki føran fyri at svara á sama støði.

Limur ella ikki limur – tað er sum veljari eg heiti á flokkin. Um einki hendir á leiðsluøkinum, verður flokkurin bert ein lítil fittur skari á næsta vali.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.